# Samskipað sigling í Norðurhøvum

**Samskip tekur nú rættiliga kappingina upp við Smyril Line og Eimskip/Skipafelagið um farmaflutningin til og úr Føroyum**

FARMAFLUTNINGUR
*Edvard Joensen*



*Joel undir Leitinum er stjóri hjá Samskip í Føroyum. Hann hevur fyrr starvast hjá Eimskip, og saman við sær hevur hann tvey fyrrverandi starvsfólk frá Eimskip. Tey fara at hava høvuðsstøð í Havn. Eitt fjórða fólk er frammanundan í starvi hjá Samskip í Klaksvík*

Íslendska skipafelagið Samskip arbeiðir við ætlanum um at víðka siglingina millum Føroyar og útheimin. Felagið hevur sett fólk í starv í Føroyum og fer í næstum at lata upp egna skrivstovu í Havn. Joel undir Leitinum er settur stjóri hjá Samskip í Føroyum.

Joel undir Leitinum, sum áður hevur starvast hjá Eimskip í Føroyum, sigur, at umframt hann sjálvan eru tvey onnur fólk, sum fyrr hava starvast hjá Eimskip, sett i starv hjá Samskip. Harumframt er eisini eitt avgreiðslufólk í Klaksvík, har Samskip eina tíð hevur havt avgreiðslu, í starvi hjá felagnum í Føroyum.

– Ætlanin er at betra um flutningsmøguleikarnar hjá føroyingum, greiðir Joel undir Leitinum frá.

Men nágreiniliga hvussu hetta skal gerast, vil hann ikki koma nærri inn á enn, tí tað er ikki endaliga avgjørt. Tó skilst so mikið sum tað, at ætlanin er at fáa í lag eina rutu seinnapart í viku niður til Europa. Sum er, siglir Samskip úr Føroyum mánadag. Men av tí, at tær stóru fiskanøgdirnar vanliga eru seinni í vikuni, er upplagt, at miðað eftir at fáa part av hesum eisini, sigur hann.

Tað skilst á nýggja stjóranum hjá Samskipum, at teir ætla at England skal vera ein týðandi partur av hesum nýggja tilboðnum. Hann nevnir Immingham sum fyrstu havn, tá farið verður úrFøroyum. Síðan verður siglt til Hollands, Týklands, Danmarkar, Svøríkis og Noregs, áðrenn komið verður aftur til Føroya. Í Íslandi eru havnirnar, teir brúka, Reykjavík og Reyðifjørður á Eysturlandium.

Joel undir Leitinum greiðir frá, at umframt hesar havnirnar, sum siglt verður til í beinleiðis sambandi við Føroyar, hevur Samskip eisini rutur og sambond nógvastaðni úti í heimi. Við egnu skipum verður siglt inn í Eystrasalt, eitt nú til Russlands, og eisini verður við undirveitarum siglt til eitt nú Fjareystur.

Í Føroyum hevur Samskip higartil brúkt Klaksvík sum upp- og avskipingarhavn, men arbeitt verður við at víðka um rutunetið við øðrum føroyskum havnum eisini. Joel undir Leitinum sigur, at talan verður uttan iva um eina havn í Suðurstreymoy. Tá roknar hann Kollafjørð sum part av Tórshavnar Havn hoyrandi til Suðurstreym, sigur hann.

Siglt fer at verða við bingjuskipum upp á Føroyar, og ætlanin er at økja kapasitetin við størri skipum enn teimum, sum í dag eru á leiðini, sigur nýggi stjórin hjá Samskipum í Føroyum.

At tað frammanundan eru tveir veitarar á leiðini - Smyril Line og Eimskip/-Skipafelagið - gevur møguleika fyri at koma rættiliga við í kappingina, metir Joel undir Leitinum. Og við at betra munandi um útflutningsmøguleikarnar heldur hann realistiskan møguleika vera fyri at fáa so mikið stóran marknaðarpart, at tað fer at bera til.

# Føroyingar ferðast dúgliga

**Ferðaráðið hevur saman við Gallup kannað ferðingarmynstrið hjá føroyingum í summar. Bara 11 prosent av teimum spurdu siga seg ikki hava verið og ferðast**

FERÐING
*Edvard Joensen*



*Kanningin, sum Ferðaráðið og Gallup hava gjørt um ferðavinnuna vísir, at alt fleiri føroyingar velja at ferðast í egnum landi*
*Mynd: Edvard Joensen*

Kanningin, sum Gallup hevur gjørt fyri Ferðaráðið, vísir, at føroyingar ferðast bæði innan- og uttanalnds. Helvtin av teimum spurdu siga seg hava verið uttanlands. Men tey hava eisini ferðast í Føroyum.

Varhugin, sum fólk í ferðavinnuni hava havt av, at føroyingar ferðast meira í egnum landi, enn teir fyrr hava gjørt, tykist verða grundaður, vísir Gallupkanningin.

Serliga í meginøkinum, Eystroy, Streymoy og Vágum, hava nógv fólk feðrast. 65 prosent av teimum spurdu siga seg hava verið í hesum økinum. Eisini Norðoyggjar eru væl við. Har hava 19 prosent verið. Suðuroyggin hevur fingið 15 prosent. Verri er statt við Sandoy, ið sum tann einasta av størru oyggjunum liggur heilt niðri á átta prosentum. Síðan eru tað útoyggjarnar aðrastðani enn í Norðoyggjum, sum liggja lægri. Eitt nú siga bara trý prosent seg hava verið í Mykinesi.

Í kanningini sæst, at heili 22 prosent av teimum, sum siga seg hava ferðast í Føroyum, hava ikki gist nakrastaðni á ferðini. Tað meta tey í ferðavinnuni ikki at vera nóg gott og halda, at her er avgjørt nakað hjá teimum, ið hava gistingarhús, summarhús ella aðrar gistingarmøguleikar, at arbeiða við.

Eisini verður sagt í viðmekingum frá Ferðaráðnum, at tað tykist eitt sindur ógreitt, hvat fólk meina við, tá tey siga, at tey hava vitjað vinir og kenningar. Um tað merkir, at tey hava búð heima hjá fólki, tey kenna, ella um tey hava lænt ella leigað hús sum vinir ella kenningar eiga aðrastaðni enn har, tey búgva. Av tí, at ikki nóg væl er tilskilað her, kann vera torført at greiða rætta úrslitið av kanningin á hesum økinum.

Í niðurstøðuni, eftir at kanning er gjørd, siga tey á Ferðaráðnum, at tað tykist sum føroyingar meira og meira eru farnir at meta tað at ferðast í egnum landi sum ferðavinnu. Eisini halda tey at føroyingar meira tilvitað feðrast í egnum landi nú, enn gjørt hevur verið fyrr.

Kanningin vísir eisini, at tey, sum hava verið uttanlands og ferðast, eisini ferðast meira í Føroyum, enn meðaltalið av føroyingum annars ger.

## Skeiv borg

Í hósdagsblaðnum skrivaðu vit, at Krúnborg var komin á Skála at skifta gronina út. Har er tíverri eitt mistak hent, tí borgin, sum skal hava nýggja gron, er Sólborg og ikki Krúnborg.

**bðm.**



Fíggjarlógaruppskotið 2005:

# 197 mio. krónur í halli

**Fíggjarlógaruppskotið hjá ABC-samgonguni gevur 197 mió. krónur í halli. Landsstýrið ætlar at leggja avgjald fyri tilsamans 35 mió. krónur á sodavatn og tubbak. Loynifulli skattalættan er eisini á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005**

FÍGGJARLÓGARUPPSKOT
*Páll Holm Johannesen*




Fyrrapartin hósdagin legði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, fíggjarlógaruppskotið hjá ABC-samgonguni fyri løgtingið. Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005 gevur eitt hall á 197 mió. krónur. Samlaðu inntøkurnar eru mettar at vera 3 mia. og 461 túsund krónur og útreiðslurnar 3 mia. 657 túsund krónur

Vit endurgeva her nakrar høvuðstættir í frágreiðingina til fíggjarlógaruppskotið 2005 hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Bárði Nielsen.

### Avgjøld fyri skattalætta

Í frágreiðingini verður sagt, at minkandi virksemi í landinum, minni heildarveiting og ætlaði skattalættin eru høvuðsorsøkirnar, at inntøkurnar hjá landskassanum fyri 2005 lækkaðar sammett við undanfarin ár. Sambært fíggjarlógaruppskotinum verður mett, at inntøkurnar í ár kortini verða á leið tær somu sum komandi ár.

Eins og undanfarna samgongan hevur ABC-samgongan gjørt av leggja nýggj avgjøld á sodavatn og tubakk fyri at økja um inntøkurnar. Ætlanin er skrava 35 mió. krónur saman við at leggja avgjørd á sodavatn og tubbak.

Størsti partur av inntøkum landsins eru skattainntøkur- Landsstýrið metir, at skattainntøkurnar fara at minka við góðum 50 mió. krónum komandi ár. Hetta kemst av einum ætlaðum skattalætta á 60 mió. krónur, og at virksemið í landinum er minkað.

### Vøksturin minkar

Komandi ár halda útreiðslurnar hjá tí almenna á við at veksa, men vøksturin er minkaður nógv sammett við undanfarin ár. Rakstarútreiðslurnar økjast við 90 mió. krónum, meðan útreiðslurnar til íløgur minka við 60 mió. krónurm

Samanumtikið verður mett, at útreiðslurnar komandi ár økjast við einum góðum prosenti. Høvuðsorsøkin til vøksturin eru lønarhækkingarnar og hækkingarnar í lógarbundum útreiðslum.

Landsstýrið kann fegnast um, at rentuútreiðslurnar eru minkaðar nógv seinastu árini. Høvuðsorsøkin til tað er, at skuldin hjá landskassanum er nógv minni, enn hon áður hevur verið.

### Íløgur minka

Í figgjarlógaruppskotinum hjá ABC-samgonguni er ætlanin at skerja á iløgusíðuni, sammett við fíggjarlógaruppskoti fyri 2004. Á fíggjarætlanini fyri í ár vórðu 270 mió. krónur brutto settar av til íløgur, meðan komandi ár eru 219 mió. krónur játtaðar .

Nettoløguútreiðslan er 182 mió. krónur, tí ætlanin er at selja íbúðarbygningar við Landssjúkrahúsið fyri 30 mió. krónur og gamla Smyril fyri umleið 7. mió. krónur.

Landsstýrið leggur áherðslu á, at størri parturin av íløgunum komandi ár verða virksemisskapandi í Føroyum, og kemur hetta fyrst og fremst av, at íløgurnar til nýggja Smyril, ið verður bygdur í Spania, verða fluttar heim til Føroya.

FAKTA

**Høvuðstøl fyri fíggjarlóg 2005**

Fíggjarlógin gevur 197 mió. krónur í halli

Inntøkurnar verða 3.461 mia. krónur

Útreiðslurnar verða 3.957 mia. krónur

Játtanin til almanna og heilsumál er hækka 56 mió. krónur

Játtanin til lønir í miðfyrisitingini er lækkað 6 %

Avgjøld á tubbak og sodavatn fyri 35 mió. krónur

HALDIÐ SOSIALIN

450,- um ársfjórðingin
- sparið 395,- í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

Ókeypis
Verður sent óþostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

# Katrin Dahl Jakobsen stillar upp

**Fyrrverandi løgtingskvinnan, Katrin Dahl Jakobsen, er millum valevnini hjá Javnaðarflokkinum til býráðsvalið í Tórshavnar kommunu. Heili átta kvinnur eru á listanum hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

BÝRÁÐSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Mikukvøldið hevði Suðurstreymoyar Javnaðarfelag sín tríðja valevnisfund til kommunuvalið 9. november. Heili átta kvinnur er umboðaðar á listanum, sum í alt telir 14 fólk. Millum kvinnurnar á listanum er fyrrverandi løgtingskvinnan, Katrin Dahl Jakobsen, sum sat í løgtinginum frá 1998 til 2004.

Høvuðspersónarnar í stríðnum í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag seinastu tvey árini, Elin Lindenskov og Tórfinn Smith, eru bæði millum valevnini hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

**Valevnini eru hesi:**
Poula Apol
Katrin Dahl Jakobsen
Bjørg Joensen
Gunnvør Joensen
Elin Lindenskov
Meta Palle
Anna Maria Person
Jan Poulsen
Halla Samuelsen
Hallstein Sigurðson
Hans Jákup Simonsen
Tórfinn Smith
Rói Winter
Robert Vilhelmsen